# Laksur lítið útlát

Tað er eftir øllum at døma betur fyri umhvørvið, at fólk eta aldan laks heldur enn svínakjøt ella oksakjøt. Í hvussu er vísir ein norsk kanning, at útlátið av veðurlagsgassi av laksaaling- og -hagreiðing er bara helmingin av útlátinum, sum stendst av at framleiða svínakjøt og bara 20 prosent av útlátinum av at framleiða oksakjøt. Norsku alararnir eru sera fegnir um úrslitið, og teir vænta, at tað kann koma alivinnuni til góðar, skrivar NTB.



*Tað kemur umhvørvinum væl við, at fólk eta laks heldur enn eitt nú svíonakjøt*

*Mynd: Nordlys*

# Peter Holm í Postverks-nevnd

Fyrrverandi stjórin í Kaupthing Føroyar, Petur Holm, hevur tikið sær av løttum, síðani hann fór frá í Kaupthing, tí Eik keypti íslendsku deildina í Føroyum. Nú er hann aftur á breddanum sum nývaldur nevndarlimur í Postverki Føroya. Hini í nevndini eru Ben Arabo, formaður, Brynhild Setberg, næstformaður, og Jan Danielsen, Áslak Tausen og Korinta Jarnfoss, nevndarlimir.

# Væl minni avreitt í ár

**Tøl hjá Hagstovuni vísa, at munandi minni av fiski er komið upp á land fyrstu tveir mánaðirnar í ár í mun til somu tíð í fjør**

FISKIVEIÐA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er munandi minni komið upp á land av fiski tveir teir fyrstu mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør.

Talan er um minking av øllum fiskasløgum uttan svartkalva og øðrum flatfiski. Men her er talan um smá tøl. Serliga er talan um stóra minking í hýsuveiðini. Fyrstu tveir mánaðirnar í ár eru heili 35% minni av hýsi landað um avreiðingarskipanina. Í januar og februar í fjør landaðu skip og bátar 3.236 tons, meðan talið fyri somu mánaðir í ár er 2.094 tons. Altso ein minking upp á 1143 tons.

Eisini upsaveiðan er minkað í stóran mun, úr 13.524 tonsum í januar-februar í fjør niður í 9.315 tons í ár. Tað er ein minking upp á 4.209 tons ella 31%.

Talan er eisini um minking av toski og øðrum botnfiski, men tann minkingin er kortini ikki so ógvuslig sum fyri hýsuna og upsan. Minkingin av toski er 265 tons ella 10%, og fyri annan botnfisk 176 tons, svarandi til 13%.

Tølini fyri toskin eru 2.680 tons í 2006 og 2.415 í ár, og fyri annan botnfisk 1.407 í 2006 og 1.230 fyri januar og februar í ár.

Sama gongdin sæst eisini í veiðini av kalva og øðrum flatfiski. Samlað er minkingin fyri hesi fiskasløg 28%, og tað er sami prosentsatsur sum fyri botnfiskasløgini, nevniliga 28%.

Í mun til undanfarin ár er eisini virðið á avreiddu nøgdini minkað samsvarandi minkingina í avreiðingum. Fyri botnfisk er virðið í ár 23% minni og fyri samlaðu veiðina er minkingin í virði 25%.

Minkingin í samlaðu veiðini av fiski yvirhøvur er 24%, skrivar Hagstovan á heimasíðu síni.




*Nógv minni fiskur er komin upp á land tveir teir fyrstu mánaðirnar í ár sammett við januar og februar í fjør*

# Skift skipan og spar pening

**Ein kanning, sum Birgir I. Sigurðsson hevur gjørt, vísir, at nógvur peningur er at spara, um Microsoft Office skipanin verður skift út við OpenOffice.org**

SPARING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Kanningin vísir, at OpenOffice.org er munandi bíligari enn skipanir hjá Microsoft*

Microsoft hevur júst fingið góðkent nýggja dokumentformatið OOXML sum altjóða standard hjá ISO, men samstundis er ein nýggj kanning almannakunngjørd, sum sáar iva um júst Microsoft.

Tað er Birgir I. Sigurðsson, sum gognur á Copenhagen Business School, ið hevur gjørt kanningina, sum vendir sær móti tveimum høvuðsspurningum: »Hevur OpenOffice.org tað, sum skal til fyri at kallast eitt veruligt alternativ til Microsoft Office« og »Kann almenni føroyski sektorurin spara nakað við at skifta til OpenOffice.org« Í báðum førum er svarið klárt ja.

- Í kanningini brúki eg trý dømir: Eitt minni sjúkrahús (70 kt-brúkarar), eitt størri sjúkrahús (400 kt-brúkarar) og samlaða almenna føroyska sektorin (3.500 kt-brúkarar). Niðurstøðan í øllum trimum dømum er, at tað viðførir munandi sparingar at skifta til OpenOffice.org. Og sjálvt um dømini eru føroysk, eru úrslitini ógvuliga viðkomandi fyri almenna danska sektorin, tí bygnaðurin líkist í báðum førum, sigur Birgir I. Sigurðsson.

## Sparingar

Samlaða TCO (Total Cost of Ownership) at seta OpenOffice.org í verk á Klaksvíkar sjúkrahúsi við 70 kt-brúkarum, er útroknað til 306.554 krónur, og harvið er TCO fyri hvønn brúkara 4.379 krónur.

Verður MS Office 2007 Pro Plus hinvegin innsett, verður samlaða TCO 378.715 krónur, ella 5.410 fyri hvønn brúkara. Tað merkir, at OpenOffice.org verður 24% bíligari enn Microsoft Office 2007.

Um talan er um samlaða almenna netið við 3.500 brúkarum, kostar OpenOffice 13.181.750 krónur, meðan MS Office 2007 Pro Plus kostar heilar 25.164.250 krónur. Men samstundis vísir kanningin á, at landsnetið er lagt fast á Microsoft-grundvøllin við einari sonevndari Enterprise Agreement, sum er galdandi í trý ár fram.

- Inngangsforðingin fyri OpenOffice.org er stór, men ikki bert í kostnaði. Forðingin finst serliga í holdningum, sum kt-veitarar og almenni sektorurin hava. So leingi sum Klaksvíkar sjúkrahús, Landssjúkrahúsið og almenna netið ikki spyr eftir OpenOffice.org, og veitarar ikki bjóða alternativið fram ferskrivstovupakkamarknaðurin í Føroyum ikki at broytast, verður sagt í kanningini.